# Ársfrágreiðing 2021 hjá javnstøðunevndini

# Innihaldsyvirlit

Innihaldsyvirlit ..... 2
Samandráttur ..... 3
1. Javnstøðunevndin 2021 ..... 5
2. Eftirlit og undantaksloyvi ..... 6
3. Kærur um mismun vegna kyn ..... 7
    Kæra frá lærlingi um møguliga uppsøgn vegna barnsburð ..... 7
    Álit frá Løgtingsins Umboðsmanni ..... 8
    Kæra um starvsflyting eftir barnsburð og farloyvi ..... 8
    Kæra til Javnstøðunevndina um møguligt brot á javnstøðulógina í samband við uppsøgn av lærlingasáttmála ísbv. barnsburðarfarloyvi ..... 8
    Kæra sbrt. løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki ..... 9
4. Fyrispurningar, áheitanir og líknandi ..... 9
    Starvslýsing eftir ávísum kyni ..... 9
    Undantak at lýsa eftir ávísum kyni ..... 9
    Pápakvøld á dagstovni ..... 9
    Gjald við føðing ..... 10
    Tvær umbønir um undantak at seta nevnd ..... 10
    Áheitan til SEV um at halda grein 8 í javnstøðulógini ..... 10
5. Altjóða samstarv ..... 11
    Korona og avlýsingar ..... 11
6. Kunnandi virksemi ..... 11
    Undirvísing o.a. ..... 11
    Burðardygt vinnulív ..... 11
    Webinar ..... 11
    Arbeiðsmarknaðurin í javnstøðubrillum ..... 11
    Poddvarp ..... 13
7. Hoyringar og tilmæli ..... 13
    Foreldramyndugleikalógin ..... 13
    Málráðið ..... 13
8. Virkisøki og arbeiðssetningur ..... 13
9. Nevndarlimirnir ..... 14
10. Játtan ..... 15

# Samandráttur

Javnstøðunevndin hevur í 2021 arbeitt við hesum málum:

- luttikið í kjakinum um javnstøðu og javnstøðupolitikk
- havt eftirlit við, at javnstøðulógin verður hildin
- viðgjørt kærur um mismun vegna kyn
- viðgjørt kæru um mismun orsakað av breki
- avgreitt javnstøðufyrispurningar frá borgarum, næmingum, feløgum og stovnum
- skipað fyri og luttikið á tiltøkum og kunnandi virksemi um javnstøðu

Samanfatandi um 2021 kann sigast:

- Javnstøðuskrivstovan virkaði fyrstu ferð í eitt samanhangandi ár og fekk skipað nógv praktisk viðurskifti, s.s. journalin og ymiskar mannagongdir.
- Javnstøðunevndin søkti um hægri játtan, soleiðis at akademiskur skrivari kundi virka fulla tíð, sum neyðugt er til tess at røkja uppgávurnar hjá Demokratia og Javnstøðunevndini til lýtar. Umbønin varð gingin á møti og játtanin hækkaði við 250.000 kr. afturat.
- Koronafarsóttin hevur aftur í ár sett sín dám á bæði fundir og tiltøk úteftir, men ikki ávirkað arbeiðið innanhýsis og í nevndini stórvegis.
- Javnstøðunevndin hevur viðgjørt tvær kærur um mismun vegna barnsburð og eina um mismun orsakað av breki, sum kom umvegis Uttanríkis- og mentamálaráðið.
- Javnstøðunevndin hevur viðgjørt tvær umbønir um undantak í mun til ójavna kynsumboðan við setan av almennum nevndum og givið eitt undantak ísv. starvssetan.
- Javnstøðunevndin fekk áheitan frá Løgtingsins umboðsmanni. Nevndin tók álitið til eftirtektar og tók umrøddu kæruna upp aftur til viðgerðar.

Í fíggjarlógini fyri 2019 varð samtykt at leggja játtaninar fyri Javnstøðunevndina og Demokratia saman í eina høvuðskonto og at økja samlaðu játtanina við 250.000 kr., soleiðis at játtanin nú samanlagt var 983.000 kr. Á fíggjarlógini fyri 2020 og 2021 vóru tí nóg mikið av peningi til at nevndirnar saman kundu seta ein samskipara og skrivara fyri báðar nevndirnar í 30 tíma starv. Nevndin sendi í 2021 umbøn um hægri játtan til landsstýriskvinnuna í javnstøðumálum, hendan umbøn varð gingin á møti og við árslok 2021 eydnaðist tað landsstýriskvinnuni Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur at fáa 250.000 afturat til javnstøðumál. Harvið gjørdist tað loksins møguligt at fáa fulltíðarsettan akademiskan skrivara og samskipara á Javnstøðuskrivstovuni, sum húsast í Almannamálaráðnum.

Við hesum verður ársfrágreiðingin hjá javnstøðunevndini fyri 2021 løgd fram.

Til ber at venda sær til skrivstovuna við at ringja 212848 ella senda teldubræv til javnstoda@javnstoda.fo

Mai Laksáfoss Simonsen,

*forkvinna*

# 1. Javnstøðunevndin 2021

Í Javnstøðunevndini fyri tingsetuna 2019-2023 sita:

Mai Laksáfoss Simonsen, forkvinna, umboðandi Føroya landsstýri

Annfinnur Garðalíð, umboðandi løntakarar

Niels Winther, umboðandi arbeiðsgevarar

Hedvig Johansdóttir, umboðandi skúla-, heilsu- og almannaverk

Helena Fríðheim, umboðandi Kvinnufelagssamskipan Føroya

Varaumboð eru hesi:

Jón Harald Poulsen, næstformaður, umboðandi Føroya landsstýri

Mary Antonsdóttir, varaumboð vegna løntakarar

Jórun Gardar, varaumboð vegna arbeiðsgevarar

Leif Olsen, varaumboð vegna skúla-, heilsu- og almannaverk

Annetta Saltá, varaumboð vegna Kvinnufelagssamskipan Føroya

Longu í 2020 boðaðu Annfinnur Garðalíð og Niels Winther frá, at teir tóku farloyvi í óásetta tíð og í 2021 valdi eisini Hedvig Johansdóttir at fara í farloyvi restina av valskeiðinum. Av hesi somu orsøk eru tað varaumboðini fyri hesi, sum sita í nevndini. Jórun Gardar fyri Niels Winther umboðandi arbeiðsgevarar, Mary Antonsdóttir fyri Annfinnur Garðalíð umboðandi løntakarar, og Leif Olsen fryi Hedvig Johansdóttir umboðadi almannamál.

Tað var Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, táverandi landsstýriskvinna í almannamálum, sum eisini var landsstýriskvinna í javnstøðumálum, ið setti Javnstøðunevndina.

Fremsta uppgávan hjá Javnstøðunevndini er, at hava eftirlit við at javnstøðulógin verður hildin. Endamálið við Javnstøðulógini er, at beina burtur allan mismun vegna kyn. Javnstøðunevndin skal harafturat ráðgeva myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum og skal gera tilmæli í javnstøðumálum.

Undanfarna landsstýri við Eyðgunn Samulesen sum landsstýriskvinnu í javnstøðumálum orðaði ein javnstøðupolitik og virkisætlan fyri javnstøðu. Í hesi virkisætlan eru 27 átøk, sum skulu fremjast frá 2018 – 2022. Nýggja landsstýrið hevur ikki sett sær beinleiðis mál á javnstøðuøkinum, men Javnstøðunevndin arbeiðir við egnum málum umframt víðari við virkisætlanini hjá undanfarna landsstýri.

Av teimum 27 átøkunum er javnstøðunevndin ábyrgdari fyri hesum seks:

- Átak 1: Økja um tilvitan um kynleiklutir og javnstøðu í dagstovnum
- Átak 2: Tilvitan um kynleiklutir í námsskipanum og námsfrøði- og læraraútbúgvingunum
- Átak 5: Upplýsandi tilfar í almenna rúminum
- Átak 9: Eggja øðrum kyninum at taka ávísar útbúgvingar
- Átak 10: Eggja fleiri gentum at taka STEM-fak
- Átak 11: Kunning um parttíðarstørv í Føroyum

Harumframt er javnstøðunevndin samstarvspartur í fýra átøkum:

- Átak 16: Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum
- Átak 20: Barbershop-tiltak
- Átak 26: Kynssamtáttan
- Átak 27: Javnstøðufrágreiðing

Javnstøðunevndin fer at virka fyri og fylgja við í, at virkisætlanin í síni heild verður framd.

Í 2021 setti nevndin sær fyri at arbeiða serliga við:

- Átak 5: Upplýsandi tilfar í almenna rúminum.
- Átak 12: Økja um møguleikan at arbeiða fulla tíð
- Átak 16: Javnstøðupolitikkur á arbeiðsplássum

## 2. Eftirlit og undantaksloyvi

Samb. § 8 í javnstøðulógini skal kynsbýtið í øllum almennum nevndum, ráðum og líknandi vera javnt, og tað er skylda hjá Javnstøðunevndini at fylgja við.

Av teimum 151 almennu nevndunum og ráðunum var støðan í 2021[1] hendan býtt á stjórnarráð:

[1] Uppteljingin er gjørd eftir yvirliti hjá Løgmansskrivstovuni, dagført august 2021.

| Stjórnarráð | Nevndarlimir | M | % | K | % |
|---|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 32 | 19 | 59,4 (63,3) | 13 | 40,6 (36,7) |
| Almannamálaráðið | 66 | 31 | 47,0 (51,6) | 35 | 53,0 (48,4) |
| Fiskimálaráðið | 24 | 19 | 79,2 | 5 | 20,8 |
| Fíggjarmálaráðið | 109 | 72 | 66,1 (67,6) | 37 | 33,9 (32,4) |
| Heilsumálaráðið | 60 | 32 | 53,3 | 28 | 46,7 |
| Uttanríkis- og Mentamálráðið | 199 | 116 | 58,3 (58,2) | 83 | 41,7 (41,8) |
| Umhvørvis- og Vinnumálaráðið | 267 | 176 | 65,9 (66,8) | 91 | 34,1 (33,2) |

Samanlagt vóru 757 nevndarlimir harav 465 menn og 292 kvinnur, ella 61,4 % menn og 38,6 % kvinnur. Nógv tað javnasta býti er í Almannamálaráðnum, sum eisini varar av javnstøðumálum. Skeivasta býtið er í Fiskimálaráðnum.

Til samanbering var býtið í 2019 soleiðis. 472 menn (62,5%) og 283 kvinnur (37,5%) í hesum nevndum og ráðum. Tá eru einans tey, ið almenni myndugleikin sjálvur velur, tald við.

Sambært § 8, stk. 2 skal fyrisitingarvaldið søkja Javnstøðunevndina um undantaksloyvi, um serligar grundir eru fyri, at nevndir og ráð ikki hava kynsliga javnvág.

- Í 2021 fekk Javnstøðunevndin tvær umbønir um undantaksloyvi
- Í 2020 fekk Javnstøðunevndin eina umbøn um undantaksloyvi
- Í 2019 fekk Javnstøðunevndin tvær umbønir um undantaksloyvi
- Í 2018 fekk Javnstøðunevndin fimm umbønir um undantaksloyvi.

## 3. Kærur um mismun vegna kyn

Fólk, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, kunnu venda sær til javnstøðunevndina, hetta smb. § 11 í javnstøðulógini.

### Kæra frá lærlingi um møguliga uppsøgn vegna barnsburð

Javnstøðunevndin hevur viðgjørt kæru frá kvinnu, sum bleiv uppsøgd meðan hon var í læru. Kvinnan helt seg vera fyri mismuni vegna viðgongu, tá hon varð uppsøgd stutt eftir, at hon hevði

sagt lærumeistaranum frá, at hon var við barn. Málið var drúgt og kærari og kærda vóru grundleggjandi ósamdr um fleiri faktuell viðurskifti. Eftir drúgvar hoyringsrundur metti Javnstøðunevndin at enda, at arbeiðsgevarin hevði lyft viðvendu próvbyruna fyri, at uppsøgnin av lærlinginum ikki hevði samband við viðgonguna at gera og kærari fekk tí ikki viðhald.

Seinni kærdi kærari avgerðina hjá Javnstøðunevndini til Løgtingsins Umboðsmann, sum tók undir við kærara í, at niðurstøðan hjá Javnstøðunevndini ikki var grundað á nóg góða málsviðgerð, umframt tað metti LUM ikki, at lærumeistarin/arbeiðsgevarin hevði lyft strongu viðvendu próvbyruna og heitti á Javnstøðunevndini, at taka málið upp aftur til viðgerar. Tað gjørdi nevndin, sum eisini tók avgerð um at senda málið aftur til hoyringar hjá partunum. Málið var enn til viðgerðar við árslok 2021.

## Álit frá Løgtingsins Umboðsmanni

Tann 26 mars. 2021 fekk Javnstøðunevndin sendandi álit frá Løtingsins Umboðsmanni viðv. kærumáli móti frisørlærlingi. Sakførari umboðandi kærara hevði heitt á LUM at taka málið upp til viðgerar og við hesum kom álitið til Javnstøðunevndina, um at taka málið upp aftur til viðgerar. Millum annað varð heitt á JSTN um at senda viðkomandi skjøl til hoyringar hjá partunum, sum áður ikki vóru send. Hetta var mett um fyrisitingarligur feilur, hóast grundgevingin hjá JSTN var ein onnur. Javnstøðunevndin er fyristingarmyndugleiki og skal fylgja fyrisitingarlógini og tók sjálvsagt áheitanina til eftirtektar og tók alt málið upp aftur til viðgerar. Hoyringin fór framvegis fram við árslok og tískil var eingin niðurstøða gjørd í málinum í 2021.

## Kæra um starvsflyting eftir barnsburð og farloyvi

Javnstøðunevndin hevur viðgjørt kæru frá kvinnu umvegis fakfelag, sum eftir barnsburðarfarloyvi ikki kom aftur til sama starv, sum hon hevði áðrenn, men í eitt annað starv við lægri starvsaldri og løn. Tað stendur í javnstøðulógini grein 3, at ikki er loyvi at gera mismun á løntakara vegna kyn, og at hesin mismunur er galdandi við starvsseting, uppsøgn, starvsmeting, lønarflokking, starvsflyting, starvsuppflyting, farloyvi, arbeiðsumstøður og framíhjárættindi. Málið var framvegis til hoyringar partarnar millum við árslok 2021.

## Kæra til Javnstøðunevndina um møguligt brot á javnstøðulógina í samband við uppsøgn av lærlingasáttmála ísbv. barnsburðarfarloyvi

Avvarandi hjá lærlingi, sum møguliga hevur verið fyri mismuni vegna viðgongu hjá grannskoðaravirki, vendi sær til Javnstøðunevndina við kæru um hetta. Javnstøðunevndin vegleiddi tann avvarandi og bað somuleiðis um neyðuga fulltrú. Tann avvarandi ivaðist í, um viðkomandi, sum hevði verið fyri møguligum órætti, var áhugað í at kæra. Javnstøðunevndin frætti einki aftur frá avvarandi og gjørdi tí ikki meira við málið.

### Kæra sbrt. løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki

Umframt at virkisøkið er lógarfest við løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, hvørs endamál er at beina burtur allan mismun vegna kyn er Javnstøðunevndin eisini kærumyndugleiki í løgtingslóg nr. 63 um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

Nevndin hevur í 2020 havt eina kæru í hesum sambandi, og kæran helt fram í 2021. Kæran kom umvegis Uttanríkis- og Mentamálaráðið, sum heitti á Javnstøðunevndina um at viðgera og koma við niðurstøðum um kæru frá sjúkrarøktarfrøðilesandi, sum kendi seg vera fyri mismuni vegna niðursetta hoyrn í praktiktíðini. Javnstøðunevndin gav viðhald í kæruni, og sendi síðani niðurstøður sínar til UMMR, sum endaliga skuldi viðgera kæruna. Hvør endaliga niðurstøðan var, hevur nevndin ikki frætt enn, hóast JSTN hevur rykt eftir svari fleiri ferð.

## 4. Fyrispurningar, áheitanir og líknandi

Umframt kærur frá borgarum um mismun vegna kyn, kann eisini vera talan um fyrispurningar, har borgarar o.o. spyrja ella gera vart við møguligan mismun vegna kyn.

### Starvslýsing eftir ávísum kyni

Nevndin varð við árslok 2021 varug við starvslýsing hjá Svimjihøllini í Gundadali, sum søkti eftir mannligum lívbjargara. Hóast nevndin skilur, at tað er eyðsæð at kyn er viðkomandi, tá starvsfólk í svimjihylinum skulu kunna røkja uppgávur í skiftingarúmunum hjá ávv. kvinnum og monnum, so minti Javnstøðunevndin svimjihøllina á ásetingarnar í grein § 2, stk. 3 í javnstøðulógini, sum ásetir, at ikki er loyvt arbeiðsgevara at lýsa eftir fólki til arbeiðis, har tað á nakran hátt bendir á, at annað kynið hevur fyrimun, men at tað er møguligt hjá arbeiðsgevara at søkja um undantak. Nevndin fekk ónøktandi svar frá Svimjihøllini, sum greiddi frá umstøðunum við skiftirúmunum, men kortini ikki kom við nakrari umbøn um undantak. Nevndin gjørdi Svimjihøllina varuga við ónøktandi svarið, og gjørdi hareftir ikki meira við málið.

### Undantak at lýsa eftir ávísum kyni

Nevndin fekk umsókn frá einum stovni um at lýsa eftir stuðuli til borgara við serligum tørvi. Umsóknin varð gingin á møti, av tí at stovnurin greiddi frá at talan m.a. var um uppgávu at taka sær av persónligari røkt hjá borgaranum. Í slíkum føri er eingin ivi um, at Javnstøðunevndin altíð gevur undantak. Málið var tí skjótt avgreitt.

### Pápakvøld á dagstovni.

Ein borgari vendi sær til Javnstøðunevndina í samband við, at at hon varð vorðin varug við, at ein stovnur lýsti við serligum pápakvøldum á dagstovninum. Tað stríðir ikki ímóti javnstøðulógini at skipa fyri serligum átøkum fyri eitt nú pápar, og borgari og nevnd gjørdu ikki meira við fyrispurningin.

## Gjald við føðing

Ein borgari hevur vent sær til nevndina við fyrispurningi um eini hjún, sum skuldu gjalda við føðing á Landssjúkrahúsinum. Kvinnan, sum var útlendsk, bíðaði eftir at fáa uppihaldsloyvi í Føroyum, tá hon átti barnið. Hetta fekk hon stutt eftir. Javnstøðunevndin vendi sær til fyristingina á Landssjúkrahúsinum við hesum fyrispurningi og síðani aftur til borgaran við kunning um lóggávuna á økinum og vegleiðing um, hvussu kærast kann.

## Tvær umbønir um undantak at seta nevnd

Løgmansskrivstovan hevur í tveimum førum vent sær til Javnstøðunevdnina við umbøn um undantak. Sbrt. ásetingini í grein 8 stk. 2 kann Javnstøðunevndin, tá ið serligar grundir eru fyri tí, geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær. LMS fekk undataksloyvi í eina førinum, men ikki í tí seinna.

1) Løgmansskrivstovan vendi sær 6.3.21 til Javnstøðunevdnina ísbv. setan av Havarbeiðsbólki undir tilnevnda Vakstrarforuminum. Løgmaður ynskti at seta ein bólk við átta limum, sum við serligum innliti og royndum í mun til havið og tey vinnuøki, sum kunnu knýtast til havið. Løgmaður ynskti at seta í bólkin seks menn og tvær kvinnur og bað í tí sambandi um undtak sbrt. stk. 2 í grein 8 í javnstøðulógini. Javnstøðunevndin svaraði løgmansskrivstovuni, at hon kundi ikki ganga umsóknini á møti og løgmansskrivstovan tók avgerðina til eftirtektar.
2) Løgmansskrivstovan vendi sær aftur 22.3.21 til Javnstøðunevndina viðv. tilnevnding av limum í nýggja politiøkisráðið. Landsstýrið hevði í hesum sambandi valt at seta tríggjar kvinnur. Frágreiðingin hjá lógartænastuni snúði seg um, at við hesi tilnevning virkaði landsstýrið fyri at styrkja um endamálið við javnstøðulógini um javnari kynsbýti. Javnstøðunevndin metti tí, at talan var um serligar grundir sambært §8, stk. 2, og samtyki tískil at geva undantaksloyvi at velja umboðini í Politiøkisráðið soleiðis, sum landsstýrið ynskti.

## Áheitan til SEV um at halda grein 8 í javnstøðulógini

Javnstøðunevndin hevur havt fund við stýrið og stjórn hjá SEV ísbv. at nevndin bert er mannað av monnum. Ivi kann vera um, hvørt SEV er fevnt av grein 8, um at: *allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, skulu verða sett saman soleiðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý/bygdaráðslimir*, tó vóru SEV og Javnstøðunevndin á einum máli um, at við tí politikki sum SEV hevur annars og tað at SEV er interkommunalur felagsskapur, er tað sømiligt at nevndin hugsar um javnstøðu, tá hon framyvir skal skipast. SEV lovaði at venda aftur í november 2021, men fekk longda freist. Javnstøðunevndin hevur ikki slept málinum og væntar at frætta aftur frá stýri og stjórn hjá SEV á vári 2022.

# 5. Altjóða samstarv

## Korona og avlýsingar

Ongar norðurlendskar ella atljóða ráðstevnur hava verið í 2021, men onkrar hava verið skipaðar á netinum. Ein var Forum for jamstalldhet í Malmø í februar 2021, umframt hava verið smærri fundir og workshops umvegis alnótina, sum skrivarin hevur roynt at luttaka á. Hetta er tó ikki at samanbera við teir árligu norðurlendsku fundir, ráðstevnur, fyrilestrar o.a., sum eru ein týdningarmikil partur av javnstøðuarbeiðinum um vit skulu mennast, samstarva og læra á hesum økinum. Norðulendska samstarvi heldur tó fram, og ein fundur er ásettur at vera á vári 2022 í Akureyri.

# 6. Kunnandi virksemi

Javnstøðunevndin hevur í 2021 framleitt eitt sindur av tíðindatilfari til heimasíðuna www.javnstoda.fo, sum varð dagførd og fekk nýtt snið í 2018.

Harumframt hava verið samrøður við forkvinnuna og skrivaran í fjølmiðlunum, eitt nú í Degi og Viku, Breddanum, Góðan Morgun Føroyar, og á portalum um ymisk evni, sum viðvíkja javnstøðu.

## Undirvísing o.a.

Skrivarin hjá Javnstøðunevndin hevur havt samrøður við næmingar ella samskift skrivliga um verkætlanir og spurningar í samband við skúlauppgávur. Onkur næmingur hevur verið á skrivstovuni, men orsakað av koronastøðuni hevur tað mest verið umvegis netið. Skrivarin hevur eisini havt upplegg fyri leiðandi kvinnum í vinnu á Hotel Hafnia ísbv. altjóða kvinnudagin 2021.

## Burðardygt vinnulív

Forkvinnan í nevndini og skrivarin høvdu framløgu fyri pørtunum í samstarvinum Burðardygt Vinnulív um týdningin av javnstøðu í hesum høpi. Dentur varð lagdur á týdningin av at hugsa fjølbroytni inn í samanseting av leiðslubólkum til tess at tryggja teir bestu karmarnar og grundarlag fyri góðum avgerðum og góðum avkasti. Framløgan var á netinum orsakað av korona.

## Webinar

Samskiparin hevði upplegg til Webinar, sum BankNordik skipaði fyri við heitinum Kvinnur og fíggjarviðurskifti. Saman við Turið Arge, rakstrarstjóra í BankNordik, var hereftir orðaskifti um javnstøðu á arbeiðsmarknaðinum, barnsburðarfarloyvi, pensjón, íløgur, fíggjarlig viðurskifti og mangt annað.

## Arbeiðsmarknaðurin í javnstøðubrillum

Mikudagin 15. september 2021 vóru gott 120 fólk savnað til eitt væleydnað javnstøðutiltak í Smæruni, har Javnstøðunevndin saman við Almannamálaráðnum legði upp til orðaskifti, vitanarbýti og kjak um arbeiðsmarknaðin við nýpussaðum javnstøðubrillum.

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur setti dagin.

Tríggjar spennandi framløgur vóru á skrá og eftir hvørja framløgu var kjak og orðaskifti, har sum landsstýrisfólk, fakfólk og serfrøðingar luttóku.

Hesi vóru evnini:

- Ivonna Johansen, ph.d lesandi í barndómi og kyn og námslektari á Fróðskaparsetri Føroya, legði fram um børn, menning og javnstøðu.
- Erika Hayfield, ph.d. og lektari á Fróðskaparsetri Føroya, legði fram um familjupolitikk, kyn og arbeiðsmarknaðin.
- Kári Holm Johannesen, sosiologur og deildarleiðari á Hagstovuni, legði fram arbeiðs-marknaðarhagtøl í mun til kyn

Prátið snúði seg um alt frá fyrstu tímunum hjá nýføddu barninum á føðideildini til pensjónir, frá tunlum til umsorgan og frá óløntum arbeiði til sjómannafrádrátt og lønarsamráðingar.

Forkvinnan í Javnstøðunevndini, Mai Laksáfoss Simonsen, endaði við at siga, at tað er ein felags samfelagsábyrgd at tryggja, at borgarin og familjurnar skulu trívast. Arbeiðsmarknaðurin er svangur, og tað er neyðugt at tosa nógv meira um javnvágina millum familju- og arbeiðslív.

### Poddvarp
Demokratia og Javnstøðunevndin tóku í felag tikið stig til í fyrstu atløgu, at skipa fyri at gera fýra poddar um kyn. Í poddvarpinum hevur journalisturin Óluva Zachariasen samrøðu við fýra serfrøðingar um teirra fakøki.

Gestirnir vóru:

1) Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur, um søgu í javnstøðubrillum.

2) Albert Isfeldt, arkitektur, um arkitektur í javnstøðubrillum.

3) Eydna Skaale, retorikari, um retorikk í javnstøðubrillum.

4) Marita Rasmussen, stjóri í Vinnuhúsinum, um fiskivinnu í javnstøðubrillum.

Umleið 1200 fólk tóku poddarnar niður, umframt at teir liggja teir á okkara heimasíðu til taks hjá næmingum o.ø., sum kunnu hava áhuga í økinum framyvir.

## 7. Hoyringar og tilmæli

### Foreldramyndugleikalógin
Javnstøðunevndin hevur bara fingið eina lóg til hoyringar í 2021 og tað var foreldramyndugleikalógin. Nevndin var samd um at lógin var eitt stig rætta vegin, men hevði annars ongar viðmerkingar.

### Málráðið
Eftir áheitan frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum til Javnstøðunevndina at tilnevna persónar í Málráðið fyri tíðarskeiðið 1. juli 2021- 30. juni 2025, sendi nevndin ráðnum tilmæli um eina kvinnu og ein mann; Theodor Eli Dam, teolog og Dorit Hansen, cand.mag. Seinni gjørdist greitt, at Theodor Eli Dam varð valdur sum umboð í Málráðið.

## 8. Virkisøki og arbeiðssetningur

Javnstøðunevndin er sjálvstøðugur stovnur skipaður undir Føroya landsstýri. Javnstøðumálsøkið varð í sambandi við løgtingsvalið í september 2015 flutt úr Vinnumálaráðnum í Almannaráðið at umsita í 2016. Virkisøkið er lógarfest við løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn, og hvørs endamál er at beina burtur allan mismun vegna kyn.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er:

- at hava eftirlit við, at lógin um javnstøðu verður hildin, og at viðgera kærur frá fólki, sum halda seg hava verið fyri mismuni vegna kyn, § 9 og § 11, stk. 1.

- at virka fyri at beina burtur allan mismun vegna kyn innan øll samfelagsøkir og luttaka í samfelagskjakinum við atliti at javnstøðuspurningum og veita upplýsing grundaða á ta vitan, nevndin í arbeiði sínum fær
- at virka fyri eins møguleikum til útbúgving, arbeiði, yrkisligari og mentanarligari menning, § 1
- at virka sum ráðgevi hjá almennum stovnum, feløgum og einstaklingum í javnstøðuspurningum og at samstarva við aðrar almennar stovnar, sum arbeiða við javnstøðumálum
- at geva tilmæli í javnstøðumálum, § 9
- at geva loyvi til frávik frá lógini viðvíkjandi starvslýsing o.ø., og viðvíkjandi setan av nevndum og ráðum, § 3 stk. 2 og § 8, stk. 2, umframt
- at kunna um javnstøðulógina og -nevndina.

Harumframt er nevndin kærumyndugleiki í løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

## 9. Nevndarlimirnir

Javnstøðunevndin verður vald beint eftir løgtingsval og situr valskeiðið, ið løgtingið situr. Limir kunnu afturveljast. Eftir lógini velur Føroya landsstýri, nú avvarðandi landsstýrisfólk, formannin/kvinnuna og tilnevnir eftir tilmæli frá feløgum og stovnum fýra aðrar limir umboðandi

- arbeiðsgevarar
- løntakarar
- Kvinnufelagasamskipan Føroya
- skúla-, heilsu- og almannaverkið

Sitandi javnstøðunevnd varð í januar 2020 tilnevnd av landsstýriskvinnuni í javnstøðumálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur.

Limirnir í javnstøðunevndini eru:

- Mai Laksáfoss Simonsen, forkvinna
- Annfinnur Garðalíð, løntakarar
- Niels Winther, arbeiðsgevarar
- Helena Fríðheim, Kvinnufelagasamskipan Føroya
- Hedvig Johansdóttir, skúla-, heilsu- og almannaverkið

Varaumboðini eru:

- Jón Harald Poulsen, næstformaður, umboðandi Føroya landsstýri
- Mary Antonsdóttir, varaumboð vegna løntakarar
- Jórun Gardar, varaumboð vegna arbeiðsgevarar
- Leif Olsen, varaumboð vegna skúla-, heilsu- og almannaverk
- Annetta Saltá, varaumboð vegna Kvinnufelagssamskipan Føroya

Í 2021 hava Niels Winther, Hedvig Johandsóttir og Annfinnur Garðalíð verið í farloyvi, og tí hava varaumboðini; Mary Antonsdóttir, Jórun Gardar og Leif Olsen tikið sæti fyri tey.

Lív Patursson er skrivari.

Sitandi nevnd hevur havt 8 nevndarfundir í 2021.

## 10. Játtan

Javnstøðunevndin er á løgtingsins fíggjarlóg, og hendan játtanin er tað, sum javnstøðunevndin hevur at virka fyri. Í fíggjarlógini fyri 2019 vórðu játtaninar til Javnstøðunevndina og Demokratia lagdar saman og harumframt vórðu 250.000 kr lagdar afturat. Tá fíggjarlógin fyri 2022 bleiv samtykt, eydnaðist tað landsstýriskvinnu Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur at fáa 200.000 krónur á játtanina, soleiðis at tað loksins fer at gerast møguligt at hava ein fulltíðarsettan akademiskan skrivara / samskipara á skrivstovuni. Seinastu fýra árini hava játtanirnar til javnstøðunevndina verið:

- 2021: 700.000 kr.
- 2020: 686.000 kr.
- 2019: 635.000 kr.
- 2018: 419.000 kr.

Savnaða játtanin til Javnstøðumál var í 2021: 1.027.000 kr markaðar soleiðis:

- 327.000 til Kvinnuluttøku í politikki (Demokratia)
- 700.000 til Javnstøðunevndina